SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

kl. 20.00 Kvinnumøti - Anna Maria Joensen luttekur.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Tórshavnar hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Miðvágur
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.

Miðvágs Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og møti kl. 18 v/Dia Poulsen. Hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Sørvági
Ongin sunnudagsskúli verður sunnudagin vegna heystfrí.
Ung skipa fyri møtinum kl. 18. Jan Johannesen talar.

KEDRON í Sørvági
Sunnudagin 21.10.2007.
Breyðbróting við Læru kl. 11.00.
Møti og **dópur** kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Børnini at Møtast:
Børnini møtast kl. 11 í kjallaranum í KEDRON, har ØLL børn eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 24.10.2007.
Bønarmøti kl: 20. Og Bíbliutími kl. 21.15. Hjá Allan og Edel í Sørvági.
Sunnudagin 28.10.2007.
Breyðbróting við Læru kl. 11.
Familjumøti við luttøku av Guttorm og Súsannu Joensen kl. 18.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Børnini at Møtast:
Børnini møtast KL: 11.00 í kjallaranum í KEDRON, har ØLL børn eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 31.10.2007.
Húsbólkarnir møtast hjá teimum ymisku, onki Bønarmøti verður í Kedron.

Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11, morgunmøti við breyðbróting.
Sam Jacobsen talar.
Verið vælkomin.

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli í kirkjuni.
Sunnudagsskúlin verður nú samstundis sum gudstænastan í kirkjuni. Kl. 18 møti við Sunnleif Jacobsen úr Sandavági o.ø.

Kollafjarðar Missiónshús
Vikuskiftis møtir byrja fríggjakvøldið kl. 20.00 við Regin Høgnesen, Magda og Maibrit syngja.
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti við Thomas Juul Askham og fleiri.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.00 og sang og vitnimøti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Fríggjadag 19. oktober kl. 21 Ungdómsmøti – klaksvíkingar koma á vitjan.
Sunnudagin kl. 17 Sunnudagsskúli og kl. 17 Møti v/Claus Højgaard, Saltangará.
Mikumorgun kl. 6 Bønarløta
Mikudagin kl. 20 Bíbiltími – Trúarlæra: Trúgvin v/Una Næs.
Øll eru hjartaliga væl komin.

Berøa Saltangará
Sunnudagin 21.10.2007
kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønar og uppbyggingarmøti.

Keldan Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Pola Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Hans Jacobsen. Sangur við Kristinu N. Hansen
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti. Øll vælkomin.

Sjómanskvinnuringurin í Runavík
kemur saman í Kvinnufelagshúsinum til hugnaløtu mánakvøldið kl. 19.30. Mint verður á jólapakkarnar til sjófólki. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Karmel, Eiði
Møti sunnukvøld 21/10 kl. 19 v/ Jóhan Henriksen.

Missiónshúsið í Rituvík
Leygardagin kl. 20 opið hús.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Øssur Kjølbro.

Kirkjukjallarin í Gøtu
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Asia-toyminum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Siloa, Fuglafirði
Kvinnumøti verður mánakvøldið 22. oktober kl. 20.30. Miriam Rasmussen, Runavík talar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Henry Christiansen og kl. 21 ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, á Brekku 19
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Bergur Skovgaard.
Leygarmorgun kl. 10 morgunbøn.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við André Matras, barnamøti (sunnudagsskúli) er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22 - Opið Hús.
Sunnudag kl. 14 -Sunnudagsskúli, kl. 18 - Møti, kl. 21 - Ungdómsmøti.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 sang- og vitnimøti við leiðslu av Olvheðin Jacobsen.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

Betania, Skopun
Leygardagin kl. 14 Barnaarbeiði. Kl. 19 Evangeliskt møti í Samljóð við Bergur Skougaard.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Bergur Skougaard.
Kl. 19 Evangeliskt møti í Samljóð við Bergur Skogaard.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli, og einki møti vegna heystfrí.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskuli. Kl. 18 Møti við Hilmar Bech. Barnaansing verður. Aftaná verður drekkamunnur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sjómanskvinnuringurin kemur **ikki** saman 23. okt. men 6. november.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin 21/10-07 kl 17.00 familjutími.
Árasøla - vit minna á árasøluna sum verður 3. nov. Tey, ið vilja stuðla við vinningum o.ø. eru vælkomin at ringja tlf. 373269 ella tlf. 373150. Takk fyri.

Bethel, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Møti sunnukvøldið kl. 18.

Bygdarhúsið í Lopra
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ørkin, Reykjavík
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!

Felagið Tórshavn, gongutúrur
Sunnudagin 21. oktober kl. 10 fer Felagið Tórshavn gongutúr til Vatnsdalsvatn í Bø. Túrurin er tungur og brattur. Minnist til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við.
Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425 ella á torsinfo@torshavn.fo

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
tlf. 316491 · fax 316481
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks
Mánadagur 22. okt.
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 - 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Maritu
14.00 - 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Maritu
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl og onnur spøl
Týsdagur 23. okt.
09.00 - 12.00 Telduskeiðið byrjar aftur 30. okt. Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Sangløta Sinne Jacobsen og Fróði Sandoy
Kunning og filmur um achéindianarnar í Paraguay
Flemming Petersen
Mikudagur 24. okt.
09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Døgurði
15.00 Túrur við ella uttan stavar. Úr Tilhaldinum, niðan á minnisvarðan, frá Kongaminni út á Nóatún
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
Hósdagur 25. okt.
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
Lesibólkurin hittist aftur 25.okt.í dag
Bókin: »En mand kom til byen«, Ide Jessen verður lisin
Fríggjadagur 26. okt.
10.00 - 13.30 Matgerð v/Anne Grethe Harlou fríggjadag er avlýst fyribils
10.00 - 17.00 Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.
Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Dagtilhaldið Blákollan á Oyri
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

Dagtilhaldið í Luffustovu
Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
Mánadagin 22. okt.
Fimleikur. Felagssangur
Týsdagin 23. okt.
Telduhugni v. Jens Dalsgaard
Mikudagin 24. okt.
Opið hús
Hósdagin 25. okt.
Myndaveving v/ Greete Olsen
Fríggjadagin 26. okt.
Boccia.
Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.

Frá Dagtilhaldinum á Strondum
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
Mánadagin 22. okt.
Upplestur, vit lesa úr Nóatún.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið á Toftum, tlf 448690
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

Tilhaldið Sóljan
Klaksvíksvegur 35
Klaksvík · tlf. 459091
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Mikudagin 24. oktober
kl. 15 og kl. 20 heldur Páll Kunoy fyrilestur um Skonnartina Fossánes.
Øll eru vælkomin.
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.
Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.
Hvør dagur endar við andakt og sangi.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

Veit okkum eina hjálpandi hond
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
Ring 905699. Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.

Sandoyar Kunningarstova
210 Sandur
www.visitsandoy.fo
tlf. 361836
Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 13-16.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, við hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

Rúslinjan hjá Bláa Krossi
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

70 ár
Hósdagin 15. november verður Fanny Joensen, Hellutún 11, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin sama dag í Pálsstovu kl. 19. Tey ið vilja gleða hana við at koma í føðingardag verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 313940 ella 262940 áðrenn 3. nov.

90 ár
Tann 29. okt. fyllir Ingiborg Olsen Norðdepil 90 ár. Dagurin verður hildin leygardagin tann 27. okt. hjá dóttirni Juliannu Christiansen, Túgvuvegur 2, Norðdepil. Øll eru hjartaliga vælkomin at koma og heilsa uppá Ingiborg frá kl 15.00.

Hósdagin 8. november fyllir Martin Vilhelmsen, Brattabrekka 35, 90 ár. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum frá kl. 19. Tey, ið vilja heilsa upp á meg, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 316497 innan 30. oktober.

Silvurbrúdleyp
Tann 27. november hava hjúnini Rutt og John í Skemmuni, Porkeri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 1. desember kl. 13.00 í Porkeris skúla. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 373759 ella 254950 innan tann 13. november.

Gullbrúdleyp
6. november hava Elkin og Karlamagnus Olsen Leirvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin tann 10. november í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443047 innan 1. november.

Brúdleyp
Leygardagin 17. november kl. 15 giftast í Fríðrikskirkjuni Magnhild Joensen, Eiði og Eirikur Poulsen, Toftir.
Brúdleypið verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.
Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 222420 ella 226479 innan leygardagin 3. november.